SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Italska stjórnin gav okkum loyvi at burturflyta Abu Omar í Milano*

*Amerikanska fregnartænastan CIA*

# Vilja hava umheimin at leggja uppí



*Hesin palestinin varð særdur í einum ísraelskum álopi í gjár*

*Mynd: Reuters*

**– Tað, sum nú hendir palestinska fólkinum, er eitt brotsverk ímóti mannaættini, og tí eigur umheimurin at leggja uppí, sigur palestinski forsætisráðharrin**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Støðan í Gaza-geiranum líkist meiri og meiri veruligum kríggi, og palestinska stjórnin hevur nú mælt palestinum til at taka vápnini fram og stríðast ímóti ísraelska herinum.

Í nátt vóru hvøllir brestir at hoyra eftir bardagarnar í gjár, sum kostaðu minst 20 palestinum og einum ísraelskum hermanni lívið.

– Ísraelska álopið á palestinska fólkið er eitt brotsverk ímóti mannaættini, sigur Ismail Haniya, forsætisráðharri, sum samstundis mælti umheiminum til at leggja uppí.

Upprunaliga fór ísraelski herurin inn í Gaza fyri at fáa fatur á einum ísraelskum hermanni, sum ein palestinskur bólkur hevur burturflutt. Men teir seinastu dagarnar hevur ísraelski herurin víðkað átakið.

Kreppan er endað á borðinum hjá ST-trygdarráðnum, eftir at tey arabisku londini hava skotið upp, at ST skal fordøma Ísrael og krevja, at landið tekur herin úr Gaza-.geiranum alt fyri eitt. Uppskotið sigur sum vera man einki um tann burturflutta hermannin ella rakettirnar, sum palestinar hava skotið inn í Ísrael teir seinastu dagarnar. Uppskotið verður heldur ikki samtykt, tí USA, sum hevur sýtingarrætt í trygdarráðnum, hevur longu boðað frá, at tað arabiska uppskotið er ikki rættvíst, skrivar Reuters.

# CIA fekk hjálp í Evropa til at burturflyta fólk

**Fyrrverandi italska stjórnin visti, at CIA burturflutti ein mann í Milano, og italska fregnartænastan hjálpti CIA**

BURTURFLYTING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 17. februar í 2003 bleiv egyptin Abu Omar burturfluttur á opnari gøtu í italska stórbýnum Milano, tá nakrir menn tóku hann og tveirru hann inn í ein vøruvogn. Í skundi bleiv hann koyrdur til flogstøðina Aviano í landnyrðingspartinum av Italia og har umborð á eitt flogfar, sum flutti hann til amerikonsku herstøðina í Ramstein í Týsklandi. Her varð hann koyrdur umborð á eitt annað flogfar, sum fór til Egyptalands við honum. 13 mánaðir seinni ringdi hann til síni næstu í Milano og greiddi frá burturflytingini, og hvussu hann var vorðin píndur undir avhoyringum í Egyptalandi.

Kanningar hjá italska ákæruvaldinum hava avdúkað, at tað vóru menn hjá amerikonsku fregnartænastuni CIA, sum burturfluttu Abu Omar í Milano, og at teir fingu hjálp frá italsku hernaðarfregnartænastuni Sismi. Tað hevur havt við sær, at varastjórin í Sismi, Marco Mancini, og ein av stravsfeløgum hansara vóru tiknir mikudagin og varðhaldsfongslaðir.

Men málið er meiri álvarssamt enn so. Italska ákæruvaldið hevur skuldsett fýra amerikanarar fyri at hava brotið italska lóg við at burturflyta Abu Omar, men undir kanningunum hevur CIA svarað, at teir amerikonsku fregnartænastumenninir brutu ikki italska lóg, tí CIA hevði fingið heimild frá myndugleikunum í Rom til at taka og burturflyta Abu Omar. Tað hevur fyrrverandi forsætisráðharrin Silvio Berlusconi avsannað fleiri ferðir, men í teirri nýggju stjórnini er lítil ivi um, at Berlusconi visti, hvat CIA tókst við.

– Berlusconi-stjórnin visti um burturflytingina, segði Massimo D'Alema, uttanríkisráðharri, í gjár.

STUTT SAGT

## Vil hava Svøríki upp í NATO

Vinna teir borgarligu ríkisdagsvalið í Svøríki í september, er tað ikki óhugsandi, at landið fer at sleppa sínum óhefta uttanríkis- og trygdarpolitikki.

Fredrik Reinfeld, sum kanska verður forsætisráðharri í einari komandi borgarligari stjórn, sigur við svenskar fjølmiðlar, at eftir hansara tykki eigur Svøríki at sleppa tí óhefta politikkinum og biðja um limaskap í verjusamgonguni NATO.

– Vit hava longu samstarv við NATO á fleiri økjum, og tað er ikki annað enn rímiligt, at vit eisini fara uppí, so vit kunnu fáa ávirkan, sigur Fredrik Reinfeld. Hann dugir ikki at siga, um hinir borgarligu flokkarnir taka undir við hansara sjónarmiði.

Teirsvenskusosialdemokratarnir eru ímóti NATO-limaskapi og vilja varðveita tann óhefta politikkin.

## Arnold helst afturvaldur



Nógv bendir á, at guvernørurin á amerikanska statinum Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, verður afturvaldur, tá guvernørval verður í november.

Tá tann gamla filmshetjan valdi at stilla upp í 2003, væntaðu tey flestu, at hansara politiska tíðarskeið fór at verða stutt, men meiningakanningar vísa nú, at tey mistóku seg. Tann seinasta kanningin sigur, at Schwarzenegger fer at fáa 44 prosent av atkvøðunum, meðan demokratiska mótvalevni hansara, Phil Angelides, fer at fáa 37 prosent.

Fyri trimum mánaðum síðani vísti ein onnur kanning, at 40 prosent ætlaðu sær at velja guvernørin aftur. At hann nú fær fleiri atkvøður kemst av, at hann herfyri gjørdi av at senda menn hjá tjóðarhirðini til markið millum Kalifornia og Meksiko at steðga ólógligum innflytarum, skrivar AP.

## Tóku trolara við Svalbard

Fyri aðru ferð í fáar dagar hevur norska sjóverjan tikið eitt fremmant skip fyri ólógligan fiskiskap.

Seinasta vikuskiftið tók sjóverjan ein navnleysan og flaggleysan trolara, sum royndi í Smoguni, og í gjár varð spanski trolarin "Arosa Quincr" tikin, meðan hann royndi við Svalbard. Menn av einum sjóverjuskipi fóru umborð á trolaran, og tað vísti seg, at dagbókin var ikki í lagi, og at trolarin hevði hildið fram at fiska í sama øki, sjálvt um alt ov nógvur smáfiskur var uppií.

Sjóverjuskipið gjørdi fast á trolaran og togaði hann inn til Tromsø, har løgreglan nú tekur sær av málinum. Har liggur tann navnleysi og flaggleysi trolarin eisini, meðan løgreglan kannar hansara mál.